# Kensluborin fráfaringarløta í Tinganesi



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður saman við sínum starvsfólki til seinastu máltíðina í Tinganesi*



*Jóannes Eidesgaard, her saman við trimum øðrum javnaðarløgmonnum í Tinganesi*



*Fráfarandi løgmaður fekk parkeringsskivu við ísskravara í fráfaringargávu*

**FARVÆL**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*myndir: Jan Müller*

Tað var ein lívlig men kensluborin løta, tá Jóannes Eidesgaard, løgmaður segði farvæl í Tinganesi á middegi seinasta fríggjadag, eftir skjótt fimm ár í landsins hægsta embæti. Borðreitt var við øllum góðum, tá starvsfólkini á løgmansskrivstovuni og Jóannes Eidesgaard settust til borðs. Høvi varð at siga nøkur orð, og okkurt tárið hómaðist í eygnakrókum. Løgmaður takkaði fyri hesa tíðina hjá sær í Tinganesi og ynskti sínum starvsfólki góða eydnu við nýggja arbeiðsgevaranum Kaj Leo Johannessen. Hann fór so heldur ikki tómhentur heim. Starvsfólkini góvu fráfarandi arbeiðsgevaranum serstaka parkeringsskivu við ísskravara í gávu.